SKÁLA ÍTRÓTTARFELAG
FO-480-Skáli
Tlf. 441574/Fax 441574

STOVNAÐ
15.05.1965

FORMAÐUR
Hans Jákup Andreasen

MEISTARAR
Ongantíð - Besta úrslit
nr. 3 í 2004

STEYPAVINNARAR
Ongantíð

GREIPUVINNARAR
Ongantíð

Í 1. DEILD (4 ÁR)
2002-

Í EUROPA
Ongantíð

# Skála vil endurtaka avrikið



*Skála stóð seg sera væl í kappingini í fjør, og í ár skulu teir vísa, at teir kunnu halda dampin upp við bronsumerkjum í lummanum og europeiskum fótbólti í eygsjón*

**Fleiri útskiftingar eru á liðnum hjá Skála, men breiddin er størri, enn hon var í fjør, og nýggir útlendingar eru komnir fyri teir, sum eru farnir burturav. Skálamenn vilja vísa, at kappingarárið í fjør ikki var eitt einsamalt upplop**

**Eyðun Klakstein**
*eydun@sosialurin.fo*

Skála var tað stóra positiva yvirraskilsið í fótbóltskappingin í fjør. Eftir tvey kappingarár verið ein vissum parti í vatnskorpuni, blómaði Skála-liðið alt í einum og var við heilt har frammi í 1. deild – sum oddalið ein part av tíðini.

Móti endanum av kappingini mist liðið stevið, men bronsukrónur og eitt pláss í europeiskum fótbólti vóru nógv meira, enn nakar hevði roknað við, tá ið kappingin byrjaði.

Í ár verður tað ikki líka lætt hjá Skála at koma so óvæntað burtur úr ongum og taka hini liðini á bóli. Hini feløgini vita, at Skála kann spæla ágangandi, kvikan og málsøkjandi fótbólt, og tá ið spælið er best, er tað trupult hjá sjálvt teimum stóru feløgunum at fylgja við.

## Nýggir útlendingar

Skála hevur gjørt fleiri broytingar í hópinum hjá sær síðani kappingarárið í fjør.

Tríggir útlendskir spælarar eru givnir í felagnum, og tríggir nýggir eru komnir til felagið.

Málmaðurin Igor Bjarni Kostic, sum kom úr Íslandi, verður ikki við í ár, og Skálamenn vóna, at teir hava fingið ein betri málmann í serbiska Ladan Filopovic.

Verjuspælarin Dusan Jaic og álopsspælarin Eugen Stanciu verða heldur ikki viðaftur hjá Skála, men tveir nýggir verjuspælarar eru komnir úr Eystureuropa. Teir eru Janel Christian Gorgonaru úr Rumenia og Milic Corcic úr Serbia.

Umframt hesar halda Iulian Florescu, sum vanliga spælir á vinstra bakki, og miðvallarspælarin Nenad Stankovic fram í felagnum, og teir hava báðir týðandi leiklut á liðnum.

## Eisini føroyskar broytingar

Tað var ein dyggur smeitur fyri Skála, tá ið tað gjørdist greitt, at verjuspælarin Arnhold Berg neyvan kemur at spæla í hesum kappingarárinum, tí hann fekk ein álvarsaman knæskaða. Arnhold Berg var ein av stuðulsspælarunum í verjuni hjá Skála í fjør, og hann kom eisini inn í landsliðshitan við sínum góðu avrikum.

Hinvegin eru tveir nýggir spælarar komnir úr høvuðsstaðnum til Skála. Bjarni Jørgensen og Pætur Dam Jacobsen royndu seg í fjør í AB, men nú hava teir skift til 1. deildarfótbólt á Skála. Teir styrkja liðið serliga fram eftir vøllinum.

Fyrireikingin hjá Skála hevur verið merkt av, at fleiri spælarar hava manglað. Onkrir eru við í hondbóltinum, og fleiri av útlendsku spælarunum eru komnir til landið stutt áðrenn kappingarbyrjan.

Málið hjá Skála fyri 2005 er at vera við í røttu hálvuni av landskappingini, og kunnu teir halda dampin frá kappingarárinum í fjør, kunnu teir saktans blanda seg upp í heilt har frammi.

| Navn | pláss | landsdystir/mál | áður leikt við |
|---|---|---|---|
| Ladan Filopovic (SER) | málverji | | |
| Heini Kristiansen | málverji | | |
| Berint Andreasen | málverji | | |
| Rúni Rasmussen | verja | | |
| Bárður Danielsen | verja | | |
| Iulian Florescu (RUM) | verja | | |
| Janel Christian Gorgonaru (RUM) | verja | | |
| Milic Corcic (SER) | verja | | |
| Volmar Poulsen | verja | | |
| Rói Jacobsen | verja | | |
| Borgar Kristiansen | verja | | |
| Arnhold Berg | verja | | |
| Sveinur Justinussen | miðvøllur | | |
| Hanus Thorleifsson | miðvøllur | | |
| Pauli G. Hansen | miðvøllur | 1/0 | |
| Nenad Stankovic (SER) | miðvøllur | | |
| Jóhannes Mikkelsen | miðvøllur | | |
| Teitur R. Joensen | miðvøllur | | |
| Pætur Dam Jacobsen | miðvøllur | AB | |
| Alexandur Johansen | miðvøllur | | |
| Jonhard Frederiksberg | álop | 7/0 | |
| Tróndur Poulsen | álop | | |
| Malmberg Olsen | álop | | |
| Bogi Gregersen | álop | | |
| Bjarni Jørgensen | álop | HB, AB | |

**Tilgongd**

| | |
|---|---|
| Volmar Poulsen | Fluttur upp |
| Pætur Dam Jacobsen | AB |
| Bjarni Jørgensen | AB |
| Janel Christian Gorgonaru (RUM) | |
| Milic Corcic (SER) | |
| Ladan Filopovic (SER) | |

**Frágongd**

Igor Bjarni Kostic (ÍSL)
Dusan Jaic (JUG)
Eugen Stanciu (RUM)
Ronni Hansen

**Venjari: Johan Nielsen**
Hjálparvenjari: Pauli Poulsen